


# Soundcheck nú í miðbýnum

Tónleikahandilin Soundcheck, sum hevur hildið til í Miðlon, er nú fluttur til Dr. Jakobsensgøtu í miðbýnum, har sum Mótaskálin var. Talan er um ein serhandil við tónleikaútgerð, upptøkutólum og ljóðførum.

Johannes Ólavsson, sum eigur og rekur handilin, sigur, at hann hevur lagt serligan dent á heimastudioútgerð. Eisini kunna fólk koma inn á gólvið at gera smærri tónleikaupptøkur ella at gera sínar egnu lýsingar. Øll eru vælkomin at koma við fyrispurningum, so finna vit í felag út av eini loysn, um talan er um tónleik, lýsingar ella okkurt heilt annað.

Umframt ljóðfør sum gittarar, keybord og trummur selur handilin eisini tilhoyr til ljóðførini. Alt sum vit selja eru kvalitetsprodukt av kendum merkjum sum t.d. Xotic og Wampler, Annars selja vit ljóðfør av merkjunum Yamaha, Roland, Vox, Marshall og Korg eins og Adam hátalarar, sigur Johannes.

Arbeitt verður í løtuni við eini heimasíðu við nethandli, har fólk kring landið sjálvi kunnu keypa sær vørurnar umvegis internetið. Tann heimasíðan verður klár at taka í nýtslu síðst í januar.

Soundcheck er, sum tann einasti handilin í Føroyum, autoriserað umboð upp á stórar talgildar mixipultar frá Yamaha.

Vit leggja dent á at selja kvalitet til ein góðan prís, sigur Johannes Ólavsson.




# Hetta er mín jólasangur

## Dorethe Bloch: *Børn og voksne i kærlig krans*

– Eg havi eina bakgrund niðrifrá. Eg var 31 ár, tá eg flutti higar til Føroyar, greiðir Dorethe Bloch av Velbastað.

Tá omma mín kom at halda jól hjá mammu og systur míni, las hon altíð søguna hjá Johan Krohn "Peters jul". Tá kundu jólini byrja.

Søgan um jólini hjá Peter hoyrdi saman við bílætinum av tí gamla Keypmannahavn, ið omma mín hoyrdi til. Hon hevði alt lívið búð innanfyri vøllgarðarnar, uttan um Keypmannahavn.

Ein av jólasangunum, ið mær dámdi, og enn dámi sera væl, sjálvt um ikki nógv kenna hann, er Elith Reumerts (pápi Poul Reumert) "Børn og voksne i kærlig krans" frá "Nøddebo Præstegård".

– Lagið er so vakurt, sigur Doreth Bloch.



JÓL

*– Hjá okkum byrjaðu jólini, tá omma hevði lisið "Peters Jul" hjá Johan Krohn, sigur Dorethe Bloch av Velbastað*

*Børn og voksne i kærlig krans,*
*rundt omkring træet vandre,*
*alt under lysenes festlige glans,*
*hånd i hånd med hverandre.*

*Ak! om vi kunne føre enhver,*
*som er forladt og ene,*
*ind under lysenes rigdom her,*
*under de grønklædte grene.*

*Ak! om vi kunne med barnetro*
*fylde de hjerter, som græde!*
*så at de følte barnefro,*
*julens velsignede glæde.*

*(Elith Reumert 1899/J.P.E. Hartmann)*